LM-088/2023

Fylgiskjal 7.

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
FO-110 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 05.02.2024
J. nr. (MEGD): 701-1-2024
Ummælistíð: 08.01.2024 - 05.02.2024
J. nr (LMR): 23/09500-48

Hoyringarskriv viðvíkjandi
Uppskoti til løgtingslóg um fosturtøku
(Fosturtøkulógin)

MEGD takkar fyri fundin við Løgmálaráðið í juli 2023 um galdandi fosturtøkulóg frá 1956, og fyri høvið at senda hoyringarskriv til hetta uppskotið til nýggja fosturtøkulóg.

Innihaldsyvirlit

A. Inngangur 2
B. Mismunur vegna brek 4
C. Endamálsorðingin 12
D. Serkunnleiki um viðurskifti hjá fólki, ið bera brek 13
E. Ráðgevingin og rættartrygdin skulu vera hóskandi tillagað 14
F. Viðmerkingar til kap. 2: Avleiðingar av uppskotinum 16

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

A. Inngangur

1. Við støði í altjóða brekrættindasáttmálanum[1] tekur MEGD undir við at gamla fosturtøkulógin frá 1956 skal dagførast. Við grundarlagi í viðtøkum felagsins[2] heldur hetta hoyringarskrivið seg einans til at viðmerkja um rættindi hjá fólki, ið bera brek, í lógaruppskotinum, og sum *óheft*[3] felag tekur MEGD ikki støðu til vikutalið sambært grein 1. Høvuðsorsøkirnar fyri at dagføra gomlu lógina eru tískil hesar:

    a) Nýggja lóggávan um fosturtøku eigur at vera við til at tryggja javnrættindi í sambandi við fosturtøku, og eigur tískil hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis at loyva ella mæla til mismun vegna brek, eins og lógin frá 1956 ger.

    b) at heilsan hjá kvinnum, ið bera brek - harundir møguleikin fyri fosturtøku - eigur at vera tryggjað, á jøvnum føti við kvinnur, ið ikki bera brek.

    c) at rættartrygdin, trygdin og viðurskiftini, sum heild, hjá kvinnum, ið bera brek, í sambandi við fosturtøku, eiga at vera javnsett við tey hjá kvinnum, ið ikki bera brek.

    d) at hugburður, vitan og kunnleiki um rættindi hjá fostrum, børnum og kvinnum, ið bera brek, í samsvari við altjóðarætt, ikki verða ávirkað av galdandi lóggávu, eitt nú soleiðis at lóggávan antin beinleiðis ella óbeinleiðis elvir til fordómar ella mismun vegna brek.

    e) Í teimum sjáldsomu førum, har barnið eitt nú ikki hevur lív lagað, ella barnið hevur stutt lív lagað í stórari pínu, og hetta er orsaka av einum breki, eigur fosturtøka tó at vera loyvd.

    f) at tann gamla lógin frá 1956, sum bæði loyvir - og eftir orðaljóðinum - mælir til fosturtøku vegna brek, er ein donsk lóg, ið frá uppruna ikki er gjørd við støði í føroyskum viðurskiftum ella áskoðanum. Nýggja fosturtøkulógin eigur at taka støði í føroyskum viðurskiftum.

[1] Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. LM-162/2008. Skjal 1.
[2] Sí *Viðtøkur fyri MEGD*, grein 2. (Sí www.megd.fo/vidtokur)
[3] Sí *Viðtøkur fyri MEGD*, grein 3. (Sí www.megd.fo/vidtokur)

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

2. MEGD mælir samstundis yvirskipað til, at nýggja lógin í størri mun, enn hetta uppskotið ger, fer at byggja á altjóða brekrættindasáttmálan. Nýggja fosturtøkulógin eigur tískil ikki at verða ein mismunarlóg, ið - eins og hin gamla frá 1956 – lættliga fer at loyva ella mæla til brek-grundaðar fosturtøkur, og hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis fer at trýsta kvinnur, orsaka av teirra breki, hvørki til ella frá fosturtøku.

   Rættindi hjá børnum og kvinnum, ið bera brek, eiga samstundis at verða framd í verki, eitt nú við munadyggum stuðulsskipanum, og viðkomandi kvinnur, ið hava rætt til fosturtøku, eiga at verða tikin upp á ráð og kunnað um rættindi teirra, og um barnarættindi, áðrenn avgerðin verður tikin.

   Her er umráðandi at hava í huga serliga viðkomandi ásetingar í brekrættindasáttmálanum:

   - grein 5 um at *javnrættindi og ongan mismun*
   - grein 6 um *kvinnur, ið bera brek*
   - grein 7 um *børn, ið bera brek*
   - grein 10 um *rættin til lív*
   - grein 23 um *virðing fyri heimi og húski*
   - grein 25 um *heilsu*

3. MEGD stúrir fyri, at hetta uppskotið til nýggja fosturtøkulóg í so stóran mun, sum mangt bendir á at tað ger, byggir á donsku fosturtøkulógina, sum er partur av donsku heilsutrygdarlógini, ið vanliga verður kallað *Sundhedsloven*.[4]

   MEGD vil enn einaferð gera vart við, at rættindi, ið viðvíkja fólki, ið bera brek, sum búgva í Føroyum, eiga at vera grundað á viðurskifti, áskoðanir, umstøður og rættarstøðuna í Føroyum. Føroyar hevur eitt nú ongan mannarættindastovn, og sivilsamfelagið hevur munandi minni fíggjarliga orku eitt nú til at luttaka í lógarsmíði og eftirliti.

   Harvið er øktur vandi fyri at lógir ella ásetingar, sum tykjast at vera tikin úr donskum lógum, ikki verða rætt ella rímuliga tillagað, skipað og hildin við støði í føroyskum viðurskiftum. MEGD vónar, at hetta hoyringarskrivið verður væl móttikið í sambandi við viðgerðina á Føroya Løgtingi.

[4] *Sunhedsloven*. LBK nr 1011 af 17/06/2023. Sí kapitul 25.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

B. Mismunur vegna brek

4. Løgtingslógaruppskotið nýtir onga allýsing av hugtakinum *brek*. Samstundis hevur hugtakið *brek* sera grundleggjandi týdning fyri lógina, og rættindini hjá fólki, ið bera brek, ið kunnu vera ávirkað av lógini. MEGD mælir til, at løgtingslógaruppskotið fær innført allýsingina úr altjóða brekrættindasáttmálanum, ið byggir á framkomna serkøna vitan og semju millum heimsins lond. Allýsingin úr altjóða brekrættindasáttmálanum er hendan:

> *Fólk, ið bera brek, fevna um tey, sum hava varandi likamlig, sálarlig, vitborin og kenslulig mein, sum í samvirki við ymsar forðingar kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu vera við í samfelagnum á jøvunum føti við onnur.*[5]

5. Eisini er viðkomandi at vísa til altjóða brekrættindasáttmálan, ið lýsir hugtakið *mismunur grundaður á brek*:

> *at skilja sum ein og hvør munur, útihýsing ella avmarking, grundað á brek, sum hevur til endamáls ella sum ávirkan at skaða ella gera til einkis, at fólk við breki javnbjóðis øðrum kunnu viðurkenna, njóta og nýta øll mannarættindi og grundleggandi politisk, búskaparlig, sosial, mentanarlig, borgarlig ella onnur frælsi. Tað fevnir um allan mismun, eisini at fáa noktað rímiligar tillagingar.*[6]

6. Altjóða brekrættindanevndin hevur útgreinað, at *mismunur* móti fólki, ið bera brek, eigur at verða greinað og tulkað, bæði sum *beinleiðis* og *óbeinleiðis* mismunur vegna brek.[7]

7. MEGD vil vísa á, at altjóða brekrættindanevndin hevur staðfest í viðmerking til sjálvan sáttmálan, at lond hava skyldu at virða, verja og fremja javnrættindi hjá øllum fólkum, ið bera brek, og at verja tey móti mismuni. Lond hava tískil skyldu at ikki taka nøkur stig, ið fremja mismun vegna brek. Ítøkiliga merkir hetta, at londu hava skyldu at

[5] Brekrættindasáttmálin. Grein 2, stykki 1.
[6] Brekrættindasáttmálin. Grein 2, stykki 2.
[7] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General Comment on Equality and Non-discrimination (Article 5). CRPD/C/GC/6. Stykki 20 (a) og (b).

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

dagføra ella broyta lógir, reglugerðir, siðvenjur ella venjur, ið fremja slíkan mismun.[8]

8. MEGD vil samstundis vísa á, at altjóða kvinnurættindanevndin og altjóða brekrættindanevndin í felags skrivi hava víst á, at sambært grein 5 í altjóða kvinnurættindasáttmálanum og grein 8 í altjóða brekrættindasáttmálanum, eiga lond at liva upp til skyldur teirra at basa grundleggjandi og bygnaðarligu orsøkirnar til, at mismunur verður framdur móti kvinnum, ið bera brek. Hetta inniber at lond eiga at seta tiltøk í verk, sum niðurberja fordómar og hugburð, ið fremja mismun vegna brek, umframt at menna virðingina fyri rættindum hjá kvinnum við breki, í øllum aldrum, umframt foreldrum at børnum, ið bera brek.

9. Barnarættindanevndin hjá ST hevur eisini staðfest viðvíkjandi grein 3 í altjóða barnarættindasáttmálanum um *barsins besta*, at í øllum málum, ið viðvíkja børnum, eigur *barsins tørvur* at vera tað atlitið, ið verður vigað fyrst og fremst í mun til onnur atlit. Hendan staðfesting vendir sær ítøkiliga til lóggeva og aðrar myndugleikar, sum hava fingið ábyrgd og álit at gera lógarverk, ið skal verja rættindi hjá børnum, ið bera brek. Heilt grundleggjandi fyri hugtakið *barnsins besta* er, at um nakar ivi viðvíkjandi viðurskiftum, sum kunnu fremja mismun, fordómar ella skaða móti børnum, so eigur hesin ivi at koma barninum til góðar. Eru sostatt nøkur atlit, ið kunnu sáa iva um støðuna hjá barninum, ið eitt nú kann leiða til, at barnið fær lív lagað, ella ikki, orsaka av einum breki, so eigur ivin at verða tulkaður á slíkan hátt, at hann til barnsins besta.

10. Við grundarlagi í stykki 1-9 í hesum hoyringarskrivi vil MEGD mótmæla, at lógaruppskotið, serliga við treytunum í grein 3, stykkir 3 og 4, loyvir brek-grundaða fosturtøku eftir 12. viku, antin um:

> **Grein 3**
> *Ein kvinna, sum býr í Føroyum, kann fáa loyvi til at fáa fosturtøku eftir 12. viku um:*
>
> 3. stykki
> *vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarslig sálarlig ella likamlig brek ella sjúku*

[8] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General Comment on Equality and Non-discrimination (Article 5). CRPD/C/GC/6.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

ella

4. stykki
um kvinnan orsakað av likamligari ella sálarligari sjúku ella sálarligum menningartarni ikki megnar at hava umsorgan fyri barninum á fullgóðan hátt.

11. Vandin fyri at fremja mismun vegna brek er sera umfatandi, og mangar grundleggjandi avbjóðingar standast í hesum føri, millum annað við:

a) at tað bæði læknaliga og sosial/samfelagsliga er ómetaliga trupult, og ofta ógjørligt, at meta um, hvørt mamma ella barn fáa mein, *sum í samvirki við ymsar forðingar í samfelagnum kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu vera við í samfelagnum á jøvunum føti við onnur.*

b) Tað eru grundleggjandi avbjóðingar við at stigbenda hugtakið brek, og harvið meta um, nær eitt brek er *álvarsligt* ella ikki.

c) Tað eru grundleggjandi avbjóðingar við at stigbenda hugtakið *umsorgan*, og harvið meta um, nær ein mamma ikki fær havt umsorgan fyri barninum á fullgóðan hátt, serliga um hetta er í samvirki við samfelagið, ella møguligar forðingar ella møguleikar í samfelagnum.

d) Orðingarnar í tekstinum leggja upp til, og kunnu við tíðini mana fram ein hugburð ella mentan, ið tekur fyri givið, at eitt lív við breki, er minni vert at liva, og at fólk við breki eru í minni mun menniskju, enn onnur, ið ikki bera brek. Brekrættindanevndin hjá ST hevur ávarað ímóti at lóggáva bæði beinleiðis og óbeinleiðis fremur mismun eitt nú orsaka av innihaldi, orðingum ella diskursi.[9]

e) Nýggja fosturtøkulógin fer sambært uppskotinum eisini at fremja mismun móti kvinnum, ið bera brek. Sambært grein 3, stykki 4, loyvir uppskotið fosturtøku, um mamman ber brek. Somu atlit, sum áður eru nevnd, eru galdandi í sambandi við mismun móti kvinnuni, ið ber brek. Tað er einans í samvirki við ymsar

[9] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General Comment on Equality and Non-discrimination (Grein 5). CRPD/C/GC/6.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

forðingar í samfelagnum, ið kunnu forða fyri, at fólk ikki kunnu vera við í samfelagnum á jøvunum føti við onnur, at vit tala um eitt brek. Harav hevur tað alstóran týdning, at rættindi hjá kvinnum, ið bera brek, verða framd í verki, við góðum og væl gjørdum samfelagssligum skipanum, og at kvinna, ið ber brek, í sambandi við fosturtøku, verður væl kunnað um rættindi hennara og rættindini hjá barninum, um tað verður føtt, eitt nú til sosialar, heilsutrygdarligar ella fíggjarligar tillagingar, eitt nú til tillagað starv.

f) Atlit eiga at verða tikin til at tillaga samskifti um hesi viðurskifti, eitt nú við løttum máli, teknmálstulking og at samrøður vera hildnar undir góðum og tryggum umstøðum.

12. MEGD mælir til, at nýggja fosturtøkulógin hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis skal eggja til ella loyva mismuni vegna brek. MEGD mælir tískil til at strika grein 5, sum ásetir at: *er fostrið lívført, kann loyvi til fosturtøku bara verða givið, um umstøðurnar nevndar í § 3, stk. 1, nr. 3 avgerandi tala fyri tí.*

13. Søgan hevur lært okkum, at rættindi hjá ávísum samfelagbólkum og minnilutum hava verið skerd. Orsøkirnar hava verið mangar, eitt nú vegna húðarlit, kyn, tjóðskap, átrúnað og brek. Kjarnin í mannarættindum er tískil, at øll hava náttúrliga og ómissandi íborna tign og virðing. *Rætturin til lív* varð upprunliga tískil tikin við í altjóða brekrættindasáttmálan, grein 10, nevniliga fyri at staðfesta greitt, at fólk, við breki, nevniliga hava rætt til somu virðing og rættindi, og onnur, ið ikki bera brek, og harvið verður forðað fyri fordómum, hugburði og fatanum, um eitt nú at lívið hjá fólki, ið bera brek, ikki er virðiligt og ikki vert at liva.[10]

14. Eingin semja var millum londini, sum upprunaliga smíðjaðu altjóða brekrættindasáttmálan um, ítøkiliga nær *lívið* byrjar.[11] Tískil ásetur brekrættindasáttmálin einki um hetta evnið. Tískil er tað skyldan hjá londum at sjálvi semjast, grundgeva og neyvt seta orð á, nær og undir hvørjum treytum, tey meta at eitt *lív* byrjar. Hetta kjakið hevur fleiri ferðir verið alment frammi í Føroyum, tá evnið *fosturtøka* hevur verið umrøtt, men aldrin í sambandi við onnur evni ella í sær sjálvum. Eingin

[10] Ilias Bantekas, Michael Ashley Stein, Dimitris Anastasiou (ed.). 2018. *The UN Convention on the Rights of Persons with Disabilities: A Commentary*. Oxford University Press. Síða 288.
[11] Sama kelda sum áður. Síða 289.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

breið semja er framvegis um hendan grundleggjandi spurning, hóast bæði ávís fakøki (t.d. innan lívfrøði, evnafrøði, sosialvísund og gudfrøði) hava gjørt metingar og kanningar av nær lívið byrjar.

15. Sambært altjóða mannarættindalóg er *rætturin til lív* hin mest týðandi, og einki frávik ella undantak eigur undir nøkrum umstøðum at vera givið til tess at skerja hendan rætt, sjálvt ikki í kreppustøðum, ið hótta bæði land og fólk. Mannarættindanevndin hjá ST hevur útgreinað, at hóast royndir vísa, at vandi er fyri at tulka rættin til lív á avmarkandi hátt, so eigur rætturin til lív tó ongantíð at vera tulkaður avmarkandi ella smalt.[12]

16. Sambært viðmerkingum til brekrættindasáttmálan eru tey óføddu, ið bera brek, í serligum vandabólki fyri at missa rættin til lív. Leiðandi serfrøðingar innan viðurskifti hjá fólki, ið bera brek, hava staðfest, at mismunur eigur ikki at vera framdur móti menniskjum í mun til aldur, ella í mun til stødd ella slag av breki, soleiðis at tignin sum *menniskja* verður treytað av kanningum ella royndum, sum kunnu vera tilvildarligar, ósamanhangandi, ófullfíggjaðar og kunnu skapa mismun.[13]

17. Nýggja lógaruppskotið loyvir úrveljing/fráveljing av *eugeniskum* (*ættarrøktarligarligum*) orsøkum. Viðmerkingar til altjóða brekrættindasáttmálan[14] ávara annars ímóti slíkum skipanum, sum loyva at fosturtøkulóggáva hjá londum loyvir *úrveljing/fráveljing* vegna brek. MEGD stúrir tí fyri, at rættindini hjá bæði mammu og barni kunnu verða skerd, og bæði innihaldið og orðaljóðið í lógini kunnu elva til trýst á mammuna at velja børn við breki frá. Til tess at forða mismuni, er tískil neyðugt at hyggja grundleggjandi eftir sambandinum millum *javnrættindum* og *rættinum til lív*. Í samsvari við viðmerkingarnar til altjóða sáttmálan, hevur MEGD ta fatan, at grundað á grein 5, 10 og 25 í brekrættindasáttmálanum, er brek-grundað fosturtøka ein úttrykkiligur og greiður háttur at skerja rættindi hjá kvinnum, ið bera brek, og rættin til lív hjá fólki, ið bera brek.

---

[12] CCPR General Comment No. 6: Article 6 (*Right to Life*). Adopted at the Sixteenth Session of the Human Rights Committee, on 30 April 1982. CCPR/C/GC/36.

[13] Ilias Bantekas, Michael Ashley Stein, Dimitris Anastasiou (ed.). 2018. *The UN Convention on the Rights of Persons with Disabilities: A Commentary*. Oxford University Press. Síða 289.

[14] Ilias Bantekas, Michael Ashley Stein, Dimitris Anastasiou (ed.). 2018. *The UN Convention on the Rights of Persons with Disabilities: A Commentary*. Oxford University Press. Síða 305.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

18. Ásetingin í grein 5 staðfestir, at um fostrið er lívført, men ber brek, kann rætturin hjá tí til lív verða avmarkaður beinleiðis orsaka av brekinum, ið tað ber, sambært grein 3, stykki 3. Harav verður rætturin til lív hjá barni, ið ber brek, tulkað avmarkandi og skerdur, beinleiðis orsaka av brekinum. Hetta tykist greitt at stríða ímóti altjóða brekrættindasáttmálum, við tað at talan er um beinleiðis mismun vegna brek. Við nevndu áseting er enn eitt atlit, ið talar fyri, at nýggja fosturtøkulógin, eins og tann frá 1956, framvegis verður ein mismunarlóg, ið leggur upp til mismun vegna brek. Í teimum heilt sjáldsomu førum, har barnið eitt nú ikki hevur lív lagað ella hevur stutt lív lagað í stórari pínu, og hetta er orsaka av einum breki, eigur undantak at vera givið, soleiðis at fosturtøka verður loyvd.

19. Altjóða brekrættindanevndin hevur ikki viðmerkt nakað ítøkiligt um viðurskiftini í Føroyum, Grønlandi og Danmark viðvíkjandi rættinum til lív, men í sama høpi hevur nevndin tó víst sína stúran fyri: [15]

a) at brekrættindasáttmálin er ikki greidliga skrivaður inn í føroyska, danska ella grønlendska lóggávu.

b) at myndugleikar og dómstólar hava ov avmarkaða kunning og vitan um, hvussu brekrættindasáttmáin eigur at vera útintur.

c) at almennir ábyrgdarar ikki eru nóg tilvitaðir um skyldur teirra at fremja og útinna brekrættindasáttmálan.

20. Altjóða brekrættindanevndin hevur eygleitt og viðmerkt støðuna í londum, ið loyva brek-grundaða fosturtøku. Eitt dømi var í 2017 um støðuna í Stóra-Bretlandi, har nevndin viðmerkti at: [16]

> *Nevndin stúrir fyri áskoðanum í samfelagnum, ið útihýsa folk, ið bera brek, grundað á at lív teirra hevur lægri virði, enn tað hjá øðrum, og um at steðga barnsburði upp á nakað tíðspunkt grundað á manglandi førleikar hjá fostrinum.*
>
> og

[15] Committee on the Rights of Persons with Disabilities, 'Concluding Observations on the Initial Report of Denmark'. UN Doc CRPD/C/DNK/CO/1 (30 oktober 2014). Stykki 12.
[16] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. Concluding observations on the initial report of the United Kingdom of Great Britain and Northern Ireland. 3. Oktober 2017. Skjal CRPD/C/GBR/CO/1.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

> *Nevndin mælir til at landið broytir abortlógina samsvarandi. Rættindini hjá kvinnum til at fáa børn og til seksuelt sjálvræði eiga at verða vird, uttan at tað samstundis er neyðugt at legalisera selektiva abort, ið er grundað á manglandi førleikar hjá fostrinum.*

21. Í samsvari við tilmæli hjá altjóða brekrættindanevndini mælir MEGD til at lógaruppskotið virðir rættindini hjá øllum kvinnum – eisini kvinnum, ið bera brek – eitt nú til at fáa børn, og til seksuelt sjálvræði, uttan at samstundis legalisera brekgrundaða (*selektiva*) abort, ið tekur støði í manglandi førleikum ella breki hjá fostrinum.

22. Brekrættindanevndin hjá ST hevur í sama høpi eygleitt og viðmerkt støðuna í londum, ið loyva brek-grundaða fosturtøku seinni í graviditetinum, enn har barnið ikki ber brek. Eitt dømi var í 2011 um støðuna í Spania,[17] har nevndin viðmerkti at:

> Har galdandi lóg loyvdi tvær ítøkiligar støður, har tíðarfreistin fyri at loyva fosturtøku kann verða økt, um fostrið hevur eitt brek: fram til 22 viku, um talan er um váa fyri álvarsomum ónormaliteti í fostrinum, og longri enn viku 22 tá, millum annað, ein sera álvarsom og ólekilig sjúka er staðfest í fostrinum. Nevndin mældi til at fara burtur frá at skilja ímillum tíðarfreistir, grundað á brek ella sjúku.

MEGD hevur skilt, at skanningar bæði áðrenn og eftir 12 viku av kvinnum, ið eru við barn, í Danmark føra við sær at børn, ið bera brek, verða sorterað frá. Eingin orsøk tykist at vera til tess at halda at støðan verður øðrvísi hjá okkum í Føroyum.

Brek-grundaðar fosturtøkur fara tí mest sannlíkt at vera framdar, sum eisini bendir greitt á, at nýggja fosturtøkulógin verður ein mismunarlóg, um hetta ikki verður rættað. Royndir vísa longu, at ávísir samfelagsbólkar, eitt nú fólk við menningartarni, eru í øktum vanda fyri týning.[18]

---

[17] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. Concluding observations of the Committee on the Rights of Persons with Disabilities: Spain. Skjal: CRPD/C/ESP/CO/1. 19. oktober 2011.
[18] Gert de Graaf, Frank Buckley og Brian Skotko. *People living with Down syndrome in Europe: Births and Population*. 9. November 2022. Sí leinkju her.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Hagtøl vísa eisini, at brekgrundað fosturtøka er vanligasta orsøkin til fosturøku í grannalondum okkara.[19] MEGD ber ótta fyri at hetta rákið kemur til Føroya, og nýggja lógin fer at menna ein neiligan hugburð mótvegis fólki, ið bera brek.

23. Kvinnurættindanevndin hjá ST viðmerkti eisini í 2021, at fosturtøkulógin frá 1956 eigur at vera dagførd, soleiðis at galdandi fosturtøkulóg bjóðar heilsutrygga, atkomuliga og lógliga abort.[20] Nevndin nevnir einki um ítøkiligu treytirnar fyri slíkari dagføring, eitt nú um talan skal vera um sokallaða *fría* abort. MEGD sær ongar ábendingar um, at kvinnurættindanevndin hjá ST mælir til at nýggja lógin skal stríða ímóti brekrættindasáttmálanum, eitt nú við at mæla til brek-grundaða fosturtøku. Heldur hinvegin byggir altjóða mannarættindalóg, sum heild, á meginreglur,[21] sum staðfesta at rættindi eru algild (*universal*), sínamillum treytað (*interdependent*) og sínamillum stuðlandi (*interconnected*). Rættindatilgongdin hjá ST hevur tískil sum endamál at fáa ymisk sløg av rættindum at samvirka.

24. Í hesum høpi vil MEGD vísa á, at Hákommisserurin hjá ST[22] hevur staðfest greitt, at serliga kvinnur og gentur, ið bera brek, hava øktar avmarkingar á rættindi teirra um samanborið verður við aðrar kvinnur og gentur, eitt nú í mun til harðskap, misbrúk, umsorganarsvik, og tær hava færri møguleikar at finna sær arbeiði og inntøku.

MEGD vil í hesum høpi vísa á, at nýggja *Heildarverkætlanin – Harðskapur í parlagi og nærsambondum 2023-2028*,[23] als ikki nevnir hugtakið *brek*. Sostatt ger Føroyar eftir hesum at døma ov lítið við at á skipaðan hátt basa harðskapi móti kvinnum og gentum, ið bera brek, og hesar kunnu tí vera undir øktum trýsti og noyddar til fosturtøku, bæði av persónligum orsøkum ella umstøðum, men eisini um tær meta um framtíðarútlitini hjá barni teirra.

---

[19] Årsberetning 2022. Abortankenævnet. Styrelsen for Patientklager.
[20] Committee on the Elimination of Discrimination against Women Concluding observations on the ninth periodic report of Denmark. CEDAW/C/DNK/CO/9. 9. mars 2021.
[21] Vienna Declaration and Programme of Action, World Conference on Human Rights, Vienna, 14–25 June 1993, UN Doc. A/CONF.157/24 (Part I) (1993), stykki 5.
[22] Report of the Office of the United Nations High Commissioner for Human Rights, Equality and non-discrimination under article 5 of the Convention on the Rights of Persons with Disabilities, 9 December 2016, A/HRC/34/26, stykki 6.
[23] *Heildarverkætlanin – Harðskapur í parlagi og nærsambondum* 2023-2028. Almanna- og Mentamálaráðið. Útgivið 28. august 2023.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

25. Gjøgnumskygnið eigur at verða tryggja, soleiðis at bæði Brekrættindaumboðið og feløgini á brekøkinum eiga at hava møguleika at hava eftirlit við hesum viðurskiftum. Grein 31 í brekrættindasáttmálanum áleggur limalondunum skylduna at savna hagtøl um viðurskifti, hjá fólki, ið bera brek, umframt at hagtølini verða tøk alment, eitt nú til gransking og umboðandi feløg. Kvinnurættindanevndin hjá ST viðmerkti eisini í 2021, at Føroyar mangla útgreinað hagtøl um kyns-grundaðan harðskap móti kvinnum, ið bera brek.[24] Harðskapur, kann, sum kunnugt, vera orsøk til fosturtøku, og hesin bólkur er vanliga serliga viðkvæmur. Ynskiligt hevði sum heild verið, at hesi rættindi hjá kvinnum, ið bera brek, vera framd í verki.

26. Til tess at halda talinum av fosturtøkum so lágt, sum gjørligt, eiga rættindi hjá pápum, ið bera brek, sum heild, eisini at verða tryggjað. Um pápin ber brek, hevur hann rætt til tillagaðar umstøður at liva og virka. Pápin kann eitt nú hava rætt til tillagaðar bústaðarmøguleikar, tillagað starv, heilsutænastur, stuðulstænstur ella aðrar vælferðartænastur. Sum dømi er viðkomandi at nevna, at lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk[25] varð broytt í 2020 á slíkan hátt, at rættindi vórðu skerd hjá fólki, ið orsaka av breki vóru í tillagaðum starvi. Tá almenni arbeiðsmarknaðurin á bygnaðarligan hátt fremur mismun móti foreldrum, ið bera brek, kann ein avleiðing vera, at trýstið á hesi foreldur økist lutfalsliga nógv, soleiðis at tey av sosialum ella fíggjarligum orsøkum velja fosturtøku til.

C. Endamálsorðingin

27. MEGD mælir til at endamálið við lógini verður staðfest greitt í sjálvari lógini, eitt nú sum grein 1, umframt at endmálsorðingin verður tillagað og víðkað, í mun til verandi endamálsorðing, sí punkt 1.3 á síðu 6 í lógaruppskotinum, soleiðis at endamálið útgreinar betri hvussu lógin skal røkka teimum endamálum, ið hon ásetir.

28. Uppskotið staðfestir, at endamálið við uppskotinum er *at tryggja, at allar kvinnur eru eins fyri lógini*. Av áður nevndu orsøkum, fer uppskotið ikki at megna at tryggja, at allar kvinnur eru eins fyri hesi

[24] Committee on the Elimination of Discrimination against Women Concluding observations on the ninth periodic report of Denmark. CEDAW/C/DNK/CO/9. 9. mars 2021.
[25] Løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

lógini, uttan so at rættindi hjá kvinnum, ið bera brek, verða framd í verki. Til hetta krevst, at kvinnur, ið bera brek, verða í størri mun tiknar við í viðkomandi vælferðarskipanir og átøk, eitt nú at basa harðskapi, og tillagað starv. Eisini eiga kvinnur, ið bera brek, sum fáa fosturtøku, at fáa góða kunning og vegleiðing, við tillagaðum samskifti, um rættindi teirra. Endamálið eigur sostatt eisini at vera at fremja javnviðgerð og forða fyri mismuni orsaka av breki.

29. Uppskotið nevnir eisini, at endamálið *við uppskotinum er harafturat at hava fosturtøkutalið so lágt sum gjørligt*. Til hetta krevst eisini, at viðkomandi skipanir vera mentar, og at hesin setningur verður lisin og tulkaður í eini heild. MEGD mælir til, at nýggja lógin kunnar lesaran um, at myndugleikarnir hava skyldu at útinna viðkomandi rættindi, eitt nú tryggja ein tryggan uppvøksur, leiðbeining og upplýsing, og – sum altjóða kvinnurættindasáttmálin nevnir fleiri ferðir – tilboð um familjuplanlegging.

D. Serkunnleiki um viðurskifti hjá fólki, ið bera brek

30. Í serligu viðmerkingunum til grein 12 verður lagt upp til at MEGD og tey 24 limafeløgini skulu kunna ráðgeva, um kvinnur, eru í iva, um tær skulu hava fosturtøku. MEGD metir, at hendan treyt fyri MEGD og limafeløgini er ikki rímulig. Orsøkirnar eru mangar, eitt nú hava MEGD og feløgini í verandi støðu rættiliga avmarkaða fíggjarliga orku. Um hendan álvarsama uppgáva at ráðgeva skal vera loyst til fulnar, er tískil alneyðugt at bæði MEGD og limafeløgini vera styrkt munandi fíggjarliga. Áðrenn hetta verður ásett sum krav í lógini, er tað ein treyt, at MEGD og viðkomandi partar avtala ein fund at umrøða hetta evnið, eitt nú at umrøða ítøkiliga ábyrgdarbýtið, eyka fígging, og hvussu slík ráðgeving kann staðfestast í skriftligari avtalu millum viðkomandi partar.

31. MEGD mælir til at starvsfólk, ið hava ábyrgd sambært nýggju lógini, hava viðkomandi fakligar førleikar um viðurskifti og rættindi hjá fólki, ið bera brek. Treyt eigur tískil at vera sett við, eitt nú í grein 7, um ráðgeving, og grein 14, um samráð, at viðkomandi starvsfólk hava nøktandi fakligan kunnleika um viðurskifti og rættindi hjá fólki, ið bera brek.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

32. Eisini hevði tað verið grundleggjandi fyrimunur, um samráðið hevur eitt eyka umboð, ið hevur fakligar førleikar, serliga innan brekrættindi, at ráðgeva um hvussu almennar skipanir kunnu tryggja rættindi hjá kvinnum, ið bera brek, kunnu vera við til at stuðla undir viðurskiftini hjá kvinnu og barni, og harav vera við til at tryggja gott grundarlag at hava umsorgan við barninum, tá tað verður føtt.

E. Ráðgevingin og rættartrygdin skulu vera hóskandi tillagað

---

33. MEGD metir at uppskotið ásetir ógreiðar treytir fyri at loyva fosturtøku sambært grein 1. Atlitini, ið eru ógreið, eru knýtt at treytini, ið verður sett sambært grein 1, nevniliga at fáa kunning og vegleiðing sambært grein 7, áðrenn støða verður tikin til fosturtøku.

Neyvt merkir hetta, at grein 1 ásetir, at *kvinna, sum býr í Føroyum og er við barn, kann fáa fosturtøku, um inntrivið kann verða gjørt áðrenn endan av 12. Viku í viðgongutíðini, og kvinnan framvegis vil hava fosturtøku eftir* [treytað av] *at hava fingið kunning og vegleiðing sambært § 7.* Treytin er sostatt at kvinnan hevur fingið kunning og vegleiðing sambært § 7.

Tó nevna serligu viðmerkingarnar til grein 7 at:

Tekur kvinnan ikki av einum tilboði um ráðgeving, men vil framvegis hava fosturtøku, skal fosturtøkan fremjast, um kvinnan lýkur treytirnar fyri at fáa fosturtøku. Tað er sostatt ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan skal hava fingið ráðgeving áðrenn inntrivið.

Sostatt tykist tað ógreitt, um kvinnan hevur lokið treytina sambært grein 1 at *hava fingið kunning og vegleiðing sambært grein 7*, um hon velur hetta frá. Altso, um hon velur at ikki fáa vegleiðing og kunning, hvussu kann hon tá nakað annað enn *framvegis* vilja hava fosturtøku, um hennara tilvitska ella kunnleiki um egin rættindi, og rættindi hjá barninum, ikki eru dagførd, ella ikki neyðturviliga eru til staðar. MEGD mælir til, at orðingin verður tillagað soleiðis at grein 1 er greiðari hesum viðvíkjandi.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

34. MEGD metir, at tað er ein greiður fyrimunur fyri allar partar at fáa ráðgeving og vegleiðing frá fakfólki um møguliga fosturtøku. Ráðgeving og vegleiðing eiga at vera klár og atkomulig, tá nýggja lógin kemur í gildi.

35. MEGD metir, at rættartrygdin hjá kvinnum, ið bera brek, kann verða avmarkað ella skerd, um ítøkiligar reglur, orðingar, samskifti og mannagongdir fyri ráðgevingini ikki verða hóskandi tillagað. Atlit eiga at vera tikin til atkomu í sambandi við ráðgeving (sí punkt 1.4.6), kærumál (smb. grein 16), og til atkomu og hóskandi tillagingar í øllum viðkomandi førum, eisini har landsstýrisfólkið skal áseta nærri reglur, eitt nú í sambandi við at *skipa innihaldið í vegleiðingini, soleiðis at tryggjað verður, at allar kvinnur fáa nøktandi og somu vegleiðing*. Úrskurðir hjá kærunevndini eiga at lýsa fakligar grundgevingar fyri avgerðum, og eiga at verða alment tøkir.

36. Lógin eigur at tryggja í grein 16, ella í viðmerkingunum til grein 16, at løgfrøðingar, ið viðgera kærumál sambært fosturtøkulógini, hava nøktandi kunnleika til rættindi og viðurskifti hjá fólki, ið bera brek.

37. Sambært grein 14 verður tað landsstýrisfólkið, ið setir samráðið. Hetta kann føra við sær ymiskar avbjóðingar, og MEGD mælir tískil til, at ein meira *óheftur* setanarleistur verður skipaður, eitt nú við íblástri frá leistinum, ið verður brúktur, tá etiska ráðið verður sett. Hetta kann vera við til at tryggja meginregluna um armslongd og at limirnir í samráðnum verða skuldsettir um at vera politiskt heftir.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

F. Viðmerkingar til kap. 2:

Avleiðingar av uppskotinum

---

38. Viðvíkjandi fíggjarligum avleiðingum metir lógaruppskotið smb. stykki 2.1 at feløg ikki fara at brúka fíggjarliga orku til hetta. Sum nevnt í punkti 25, ynskir MEGD at avtala ein fund við viðkomandi partar, um hetta broytist. Feløgini eru í stóran mun rikin av sjálvbodnum, og verandi fíggjarliga orka er sera avmarkað.

39. MEGD metir, at smb. stykki 2.2 í lógaruppskotinum um *umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur*, so fer nýggja fosturtøkulóggávan at krevja meira samstarv millum viðkomandi geirar, og serliga millum Heilsumálaráðið, Almannamálaráðið og Løgmálaráðið. Hesir partar eiga at samstarva um at fáa viðkomandi rættindi framd í verki, eitt nú til tess at avmarkað talið av fosturtøkum vegna brek.

40. Uppskotið metir ikki at nýggja fosturtøkulógin fer at hava avleiðingar fyri nakrar ávísar samfelagsbólkar. MEGD tekur ikki undir við hesum. Hetta uppskotið fer í verandi líki at fremja mismun móti fólki, ið bera brek, serliga kvinnum, og um brek-grundaðar fosturtøkur verða loyvdar. Tað er umráðandi at gera neyðugar broytingar í uppskotinum, um hetta skal broytast.

41. Sambært punkti 2.7 er einasti millumtjóða sáttmáli á økinum kvinnurættindasáttmálin hjá ST. MEGD vil gera vart við, at minst tríggir aðrir viðkomandi millumtjóða sáttmálar eru innan økið:

1. Altjóða brekrættindasáttmálin
2. Altjóða barnarættindasáttmálin
3. Evropeiski mannarættindasáttmálin

42. Sambært punkti 2.7 verður sagt, at *nevndin hjá ST, sum varðar av kvinnurættindum, hevur heitt á myndugleikarnar í Føroyum um at endurskoða fosturtøkulógina, og ST hevur boðað frá, at tað er ein trupulleiki, at kvinnur í Føroyum ikki sjálvar kunnu avgera, um tær ynskja fosturtøku ella ikki*. Lógaruppskotið vísur ikki til kelduna, og MEGD hevur hóast drúgva leiting ikki megnað at funnið júst hesa áheitan. Hinvegin hevur MEGD funnið eitt tilmæli frá kvinnurættindanevnini frá 2021, um at fosturtøkulógin frá 1956 eigur at vera dagførd, soleiðis at galdandi

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

fosturtøkulóg bjóðar heilutrygga, atkomuliga og lógliga abort.[26] Altso staðfestir júst hetta tilmæli einki um sjálvsavgerðarrættin hjá kvinnuni. MEGD hevði ynskt at kelduávísingar verða givnar, tá víst verður til støðuna hjá eitt nú ST, um mál, ið hava týdning.

43. Sambært punkti 2.8 verður mett, at uppskotið ikki er í stríð við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eitt nú brekrættindasáttmálan hjá ST. MEGD tekur ikki undir við hesum av fylgjandi orsøkum.

Einki felag, ið umboðar limir, ið bera brek, hevur havt hetta uppskotið til hoyringar, áðrenn hendan meting varð gjørd. Tískil er einki grundarlag fyri at meta um, hvørt uppskotið stríðir ímóti brekrættindasáttmálanum. Hetta í sær sjálvum er í stríð við brekrættindasáttmálan.

Eins og hetta hoyringarskrivið hevur roynt at víst á eru harumframt mong atlit og treytir, ið geva greiðar ábendingar um, at uppskotið elvir til mismun vegna brek. Hetta stríðir, sum heild, eisini ímóti altjóða brekrættindasáttmálanum.

Vinaliga vegna MEGD,
Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari

[26] Committee on the Elimination of Discrimination against Women Concluding observations on the ninth periodic report of Denmark. CEDAW/C/DNK/CO/9. 9. mars 2021.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo